# Paradís hjá fiski

**Áttandi og seinasti fyrilesturin í røðini, sum Fróðskaparsetrið og Føroya Fróðskaparfelag hava skipað fyri um myndlar og tøl, verður hóskvøldið**

FYRILESTUR
*Jákup Mørk*



*Tað verður Eyðfinn Magnussen, sum hevur seinasta fyrilesturin í røðini um myndlar og tøl*

Hesaferð er tað Eyðfinn Magnussen, adjunktur á Náttúruvísindadeildini, sum hevur fyrilestur við heitinum »Føroya Banki – eitt vakstrarparadís hjá fiski«

Í tíðindaskrivi, sum er sent miðlunum, verður sagt, at flestu føroysku sjómenn hava ein serlig tokka til Føroyabanka. Hetta kemst helst av, at her hava teir ofta fingið góðan fong. Serliga er tað tann stóri toskurin, bankatoskurin, teir eru glaðir fyri. Føroyabanki er eitt serstakt øki. Rákið á Bankanum er soleiðis háttað, at sjógvurin í stóran mun heldur seg inni á Bankanum. Á hendan hátt er Føroyabanki ein sjálvstøðugt vistfrøðilig skipan, har umhvørvið hevur sett síni serstøku eyðkenni á fleiri fiskasløg og aðrar livandi verur, ið eru á Bankanum. Kendasta av hesum er helst Bankatoskurin. Tað hevur leingi verið kent, at toskurin á Føroyabanka veksur óføra skjótt. Ja, so skjótt, at hann telist millum skjótast vaksandi toskasløgini í heiminum.

### Hví veksur bankatoskurin so skjótt?

Men hví veksur toskurin á Føroyabanka so skjótt? Er tað okkurt serligt við bankatoskinum, ella er tað umhvørvið á Bankanum, sum skapar tann góða vøksturin? Hetta eru 2 áhugaverdir spurningar, ið greiða eigur at vera fingin á. Um tað er okkurt serstakt við umhvørvinum, sum er orsøkin, átti hetta eisini at sæst aftur hjá hinum fiskasløgunum, ið finnast á Bankanum. Vit kundu tí væntað, at øll fiskasløgini á bankanum vaksa skjótt.

### Vakstrarlagið hjá botnfiskinum kannað

Men er hetta nú soleiðis? Fyri at fáa greiðu á spurninginum, er vøksturin hjá 14 ymiskum fiskasløgum á Bankanum kannaður. Vøksturin er síðani samanborin við, hvussu hesi fiskasløgini vaksa aðrastaðni í heiminum. Samanberingin fevnir um úrslit frá 62 ymiskum kanningum frá 35 ymiskum økjum. Og her smæðist Føroyabanki ikki burtur í millum.

### Fyrilesturin

Fyrilestrinum byrjar við at lýsa umhvørvið á Bankanum. Komið verður inn á vøksturin hjá toskinum, og hvat tað er, sum stýrir vøkstrinum hjá fiski, og hvørja ávirkan kynsbúningin hevur á vøksturin. Vakstrarlagið hjá teimum 14 Føroyabanka-fiskasløgunum verður víst og mett verður um vøksturin samanborið við aðrastaðni. At enda verður komið inn á hvønn týdning dýpið á Bankanum hevur fyri vøksturin hjá fiskinum.

Eyðfinn Magnussen er útbúgvin kandidatur í lívfrøði frá Universitetinum í Keypmannahavn í 1993. Síðani 1994 hevur hann starvast sum adjunktur á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum. Tey fyrstu árini arbeiddi hann eisini á Fiskirannsóknarstovuni, har hann tók sær av yvirlitstrolingunum á Føroya banka.

## Vinastuldur

Tú leit í mínu eygu,
og skelvandi eg sá;
øll heimsins háðan og hevjan
í tínum eygnabrá.

Fuglur tíðliga á veingjum
tú sveimar í býnum.
Eins og ljóðføri í sangum
í hjarta mínum.

Drepandi dapurt,
óhugnaligt.
Helvitsliga vakurt,
dugnaligt.

**John Torkilsson**

Den der er blevet klog på nogen han ikke først havde kært, har aldrig levet.

*Citat Grundtvig*

Skeið:

## Gullárini: Lívsgóðska/lívsgleði

Í døgunum 17. - 19. mai skipar Tilhaldið í Tórsgøtu fyri skeiði við heitinum Gullárini: Lívsgleði og lívsgóðska.

Endamálið við skeiðnum er at skifta orð um, hvussu lívsgleði og positivur hugsunarháttur kunnu læra okkum at duga betur at ganga mótbrekkurnar í gerandisdegnum og styrkja persónmenskuna á rættan hátt. Eisini skifta vit orð um lívið og teir mongu møguleikarnar, ið vit hava, bæði áðrenn og aftaná pensjónsaldurin.

Skeiðið er ætlað komandi og verandi pensjónistum í Tórshavnar kommunu. Somuleiðis er skeiðið ein liður í politiska málsetninginum á eldraøkinum hjá Tórshavnar kommunu, sum er at kunna komandi og verandi pensjónistar um rættindi, møguleikar og viðurskifti teirra.

Undirvísarar verða:

Eyðvør Mortensen, 46 ár, sosialráðgevi og deildarleiðari á økisdeildini í Tórshavn. Eyðvør hevur starvast á almannastovuni síðani 1989.

Elsa Zachariasen, 68 ár, sjúkrarøktarfrøðingur. Elsa hevur verið leiðari í nógv ár í heimarøktini í ymsum kommunum í Danmark. Hon hevur drúgvar undirvísingarroyndir í kommunikatión, heilsu, lívsgóðsku, lívsgleði, demensskipan, og so er Elsa eisini útbúgvin láturinstruktørur.

Wanja Petersen, 48 ár, sjúkrarøktarfrøðingur og leiðari í Tilhaldinum, síðani tað lat upp 12. mars 1998.

**ave**

## Limir hjá Føroya Postfelag innrás í Hetlandi

HETLANDSFERÐ

Næsta ár hevur Føroya Postfelag 30 ára stovningardag. Í hesum sambandi setti nevndin í Postfelagnum sær fyri at skipa fyri onkrum serligum til limirnar.

Tá fundarskráin hjá felagnum varð løgd tilrættis var komið eftir, at dagarnir frá 22. til 25. apríl í ár vóru frídagar, og at hetta passaði væl til túrarnar, Norrøna siglir til Hetlands. Flogleiðin hjá Atlantsflog til Aberdeen var annað upplagt evni fyri einum felagstúri. Gjørt var av geva limunum eitt gott tilboð uppá hesar túrar.

Nú freistin er farin vísir tað seg, at nærum 150 fólk fara avstað. Serliga er tað túrurin til Hetlands, sum hevur havt stóran áhuga. Ikki færri enn 115 hava tekna seg til hendan túrin, so tað er óhugsandi, at slík fjøld av postfólki ikki fara at síggjast aftur í gøtunum í Lerwick.

## Høgni spyr um arbeiðs- og uppihaldsloyvi

**Høgni Hoydal setir nú danska integratiónsmálaráðharranum fyrispurning um trupulleikan, sum hevur tikið seg upp í Føroyum um arbeiðs- og uppihaldsloyvi**

POLITIKKUR
*Tíðindaskriv frá Norðuratlantsbólkinum*

Seinastu tíðina hevur ósemja valdað millum føroysku løgregluna og Innlendismálaráðið um arbeiðsbýtið í samband við málsviðgerðir av arbeiðs- og uppihaldsloyvum. Ósemjan snýr seg um, hvørt tað er løgreglan ella Innlendismálaráðið, sum eigur at umseta tey tilmæli til danskt, sum verða send Útlendingastýrinum.

Tá talan er um danskt málsøki, setir føroyski fólkatingslimurin Høgni Hoydal nú danska integratiónsmálaráðharranum fyrispurning um, hvørji stig skulu takast fyri at finna eina loysn.

Norðuratlantsbólkurin metir málið vera álvarsamt, tí ósemjan millum føroysku myndugleikarnar hevur við sær, at umsøkjarar ikki fáa svar ella skulu ígjøgnum óneyðuga drúgva bíðitíð.